# ÁRSFRÁSØGN
# 2012

RÁÐIÐ FYRI
FERÐSLUTRYGD

# BÚSKAPUR

Inntøkurnar fyri 2012 vóru 1,8 milliónir krónur. Yvirskotið er kr. 242.692.

Sum heild hevur miðað verið eftir at fáa útreiðslurnar niður. Serliga nógv er spart í fyrisitingarkostnaði í mun til undanfarin ár, har serstakliga skrivstovuhald og skrivstovuútreiðslur eru minkaðar munandi. Harumframt er bilurin seldur, eins og húsaleigan er minkað við kr. 49.500.

Tá um tiltøk ræður, eru útreiðslurnar eisini minkaðar fitt. Ferðslutrygdartiltøk er eitt týðandi virksiøki hjá RFF, sum sjálvandi eigur at síggjast aftur. Tó at útreiðslurnar til tiltøk í 2012 eru lægri enn enn í 2011, eru hesi tøl ikki umboðandi fyri tað, sum brúkt er til ferðslutrygdartiltøk. Hetta tí størri parturin av stuðlinum frá Tryggingarfelagnum Føroyar verður umsitin og avroknaður beinleiðis av Tryggingarfelagnum, tó at tað er fyri átøk, sum Ráðið og TF samstarva um. Átøkini eru umrødd aðrastaðni.

Inntøkurnar fyri Guðrun og Guðrun-vestar eru frá byrjan oyramerktar til framleiðslu av undirvísingartilfari. Hesa uppgávu er skjøtul settur, sum greitt er nærri frá aðrastaðni.

## HAGTØL

Yvirskipað hagtøl yvir tal á ferðsluvanlukkum við og uttan fólkaskaða finnast hjá Landsverki, Politinum og Landslæknanum. Tey eru býtt í vanlukkur við og uttan persónsskaða og tal á rúsdrekkavanlukkum og øðrum ferðslulógarbrotum. Eisini eru hagtøl fyri vanlukkur býtt á landsveg og kommunalan veg og hagtøl fyri tal á klippum í koyrikortið.

Tó er langt eftir á mál. Eingi almenn dagførd tøl eru fyri orsøkir til vanlukkur, aldur á teimum, sum vóru við í vanlukkum, nær á samdøgrinum tær hendu og so framvegis. Neyv hagtøl hava alstóran týdning fyri ferðslutrygdararbeiðið, so tað er greitt, hvar ábøtur eru fyri neyðini, og hvørji átøk eiga at verða gjørd. Eitt stórt arbeiði varð gjørt fyri at seta skjøtul á, har politirapportir vórðu gjøgnumgingnar í tíðarskeiðnum 1922-2006 við serligum denti á tíðarskeiðið 1987-2001. Avrátt varð, at Hagtalsbólkurin skuldi taka sær av víðari arbeiðnum, men hetta arbeiði er ongantíð komið í gongd. Tað er spell, og Ráðið mælir til, at arbeiðið verður tikið upp aftur skjótast til ber.



# RFF EIN EINMANSHERUR?

Frá byrjan hevur Ráðið fingið sínar inntøkur frá landskassanum, tryggingarfeløgunum og frá limagjøldum. Fram til 2008 vóru allar inntøkurnar tøkar hjá Ráðnum at ráða yvir. Umframt leiðaran vóru tvey og stundum trý starvsfólk í áttati- og nítiárunum.

Eftir 2008 hava tryggingarfeløgini gjørt av at stuðla undirvísingini fyri landsins 8. flokkum og keyp av hjálmum og endurskinsvestum, meðan restin av stuðli teirra fer til átøk. At nýta til umsiting og virksemi hevur Ráðið sostatt landskassatilskotið og limagjaldið. Landskassatilskotið er 1 millión kr., og limagjaldið fyri 2012 gav kr. 190.000. Í fíggjarkreppuni er greitt, at tað táttar í hjá øllum, men hjá Ráðnum hevur hetta merkt, at síðani 2008 hava bert verið umstøður at hava eittans starvsfólk. Skal Ráðið fyri Ferðslutrygd framhaldandi hava ein týðandi leiklut í ferðslutrygdararbeiðnum, má eisini verða raðfest soleiðis, at møguleiki er fyri einum starvsfólki afturat, og hetta gerst ikki uttan eina meirjáttan á fíggjarlógini. Mett verður harumframt, at tað sum frá líður, verður trupult at varðveita eitt fruktagott fakligt umhvørvi og framhald í arbeiðnum við bert einum starvsfólki. Roynt hevur verið at kanna møguleikar fyri at húsast saman við øðrum við á leið samsvarandi virkisøki, men higartil hevur ikki eydnast at finna eina hóskandi loysn.

Fyri at Ráðið skal megna at røkka sínum endamáli til fulnar, eigur tað at gerast gjørligt at seta eitt starvsfólk afturat. Verður landskassatilskotið økt upp úr 1 mió. kr. upp í 1.360.000 kr hevði tað borið til at sett eitt starvsfólk við miðallangari útbúgving.

## VIÐTØKUR FYRI RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

**Endamál § 2**

Endamál ráðsins er at gera ferðsluna tryggari við:

- at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi,
- at stuðla ferðsluundirvísingina við ráðgeving og stuðuli,
- at útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru,
- at skipa fyri skeiðvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
- at geva sakliga upplýsing um øll tey viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
- at samstarva í góðum stevi og hóskandi vavi við myndugleikar, stovnar og einstaklingar í ferðslutrygdarspurningum
- at fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp/-vanlukkur, skaðaorsakir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðinum og
- at fáa regluligt fjølmiðlainnivist við ferðslutrygdarboðskapi ráðsins.

Støði verður tikið í Nullhugsjónini og Ferðslutrygdarætlanini.

### UNDANTAKSSTØÐA Í NORÐURLENDSKA SAMSTARVINUM

Samstarvið millum norðurlondini, Ísland, Danmark, Noreg, Svøríki, Finnland og Føroyar røkkur mong ár aftur. Hetta samstarv er stimbrandi fyri ferðslutrygdararbeiðið og gevur dyggan íblástur. Síðani januar í 2013 er tað tó komið seg so, at stjórarnir í Svøríki, Noregi og Danmark allir eru farnir úr starvi, meðan Ísland fyribils hevur tikið seg úr samstarvinum vegna sparingar. Hetta merkir, at ársfundurin, sum skuldi vera í Føroyum í august 2013 er útsettur til august 2014.

### FERÐSLUTRYGDARÆTLAN

Ferðslutrygdarætlanin, sum er galdandi fram til 2015, hevur javnan verið á breddanum í Ráðnum. Eisini hevur hon verið umrødd í Ferðslubólkinum, tá rættiliga mong at tilmælunum í ætlanini eru framdar – serliga aftan á ferðslulógarbroytingarnar 1. oktober 2009.

Ferðslubólkurin mælti tá til, eftir innstilling frá Innlendismálaráðnum, at útseta viðgerðina við eini nýggjari ferðslutrygdarætlan til einaferð seint í heyst 2013 ella á vári 2014. Hetta tí so nógv onnur mál vóru í gongd, samstundis sum mann eisini vildi hava eitt boð upp á, hvat tann politiski myndugleikin ynskti.

### KOMMUNALAR FERÐSLUTRYGDARÆTLANIR

Ásett varð í Ferðslutrygdarætlanini, at kommunurnar skuldu koma við teirra tilmæli í seinasta lagi við ársskiftið frá 2010 til 2011.

Enn eru bert hendinga ferðsltrygdarætlaninir gjørdar á kommunala økinum. Ráðið metir framvegis, at júst tær kommunalu ferðslutrygdarætlaninar hava alstóran týdning í ferðslutrygdararbeiðnum, millum annað í at tryggja ferðsluna millum heim og skúla. Ráðið kann bert enn einaferð heita á kommunustýrini um at raðfesta henda partin frammaliga í langtíðarætlanunum fyri ta einstøku kommununa.

# SJÓNLIGT VIRKSEMI Í 2012

Dentur hevur verið lagdur á at gera fyribyrgjandi kunningina sjónliga í 2012. Í fyrra lagi hava verið fleiri sjónlig átøk, eins og vit hava havt regluligt innivist í útvarpi, men eisini stundum í sjónvarpi, bløðum og á netinum. Tátturin í morgunsendingini, 'Á vegnum', varð sendur aðru-hvørja viku, har Ráðið tók lut saman við politinum við viðkomandi evnum og at stuðla undir átøk, meðan tey koyrdu.

## FRUKTAGOTT SAMSTARV VIÐ POLITIIÐ

Royndir uttanlands vísa, at átøk sum samanseta kunningarátøk við politieftirlit hava størstan slagmátt. Ferðsluátøk broyta ikki atferð og hugburð hjá fólki her og nú. Ávirkanin kemur sum frá líður, og krevur mong ára ótroyttiligt arbeiði. Eitt gott dømi um hetta er rúsdrekka-átøkini í mong ár, sum hava verið við til at ávirka hugburðin hjá fólki. Øll átøk, sum hava verið í 2012 hava verið løgd soleiðis til rættis, at politiið hevur verið virkið á vegunum við eftirliti við sama evni samstundis. Hetta hava vit saman meldað út í byrjanini av átøkunum. Undir og eftir átøkini hevur politiið sent út síni tíðindaskriv um, hvussu støðan hevur verið, eins og Ráðið hevur borið út sínar niðurstøður samstundis.

## 1-1-2-DAGUR FYRI BARNAGARÐSBØRNUM

Saman við politinum, Sjúkraflutningstænastuni og Brandstøðini luttók RFF í sonevnda 1-1-2-degnum, sum varð hildin í mai mánaði í Gunda-dali, og samskipaður av SSP. Endamálið við 1-1-2 degnum er, at børnini fáa ein stuttligan og læruríkan dag um ferðslu, eldsbruna, bjarging og um at ringja 1-1-2. Øll barnagarðsbørn í Tórshavnar kommunu, sum skuldu byrja í 1. flokki um heystið vóru boðin. Ráðið hevði sum boðskap at greiða børnunum frá, hvussu tey ganga rætt yvirum ein veg, og at tað er týdningarmikið at brúka hjálm og endurskin.





## HJÁLMAR OG VESTAR

Hjálmar og vestar vórðu latin eins og undanfarin ár. Hjálmar verða latnir í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd, meðan endurskinsvestarnir verða latnir í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar.
Higartil eru hjálmarnir lætnir næmingunum uttan nærri frágreiðing, men frá 2013 fer politiið at greiða næmingunum frá um súkkluhjálmar. Sum liður í SSP-samstarvinum vitjar løgreglan nevniliga landsins 1. flokkar, har evnið er trygg atferð í ferðsluni.

## FERÐSLUDAGAR Í PERLUNI

Ferðsludagarnir, sum hava 15 ár á baki, verða alsamt hildnir fyri landsins 8. flokkum og Tekniska skúla. Eitt nýtt evni á dagsskránni er 'kjak, grundan og støðutakan', har sjónleikarin Hjálmar Dam hevur lagt fram tvístøður í ferðsluni, sum næmingarnir hava kjakast um. Endamálið við hesum er at geva næmingunum eftirfarandi innlit í váðafaktorar, og at fáa næmingarnar at grunda um avleiðingarnar við skeivari atferð í ferðsluni. Eftirmetingar í Danmark vísa, at hesin leistur í størri mun ger, at næmingarnir minnast og taka við sær ta vitan, ið teir fáa á ferðsludegnum.

Dømi er 15 ára gamli prutlkoyrarin, sum rennir á smágentu, sum doyr av løstinum. Um tú vart vinfólk hansara, hevði tú vart hann? Um smágentan var systir tín, hevði tú lovað prutlføraranum við til jarðarferðina? Mangar aðrar støður eru eisini, har næmingarnir taka støðu til sannlíkar støður í ferðsluni.

Væl hevur riggað, og næmingarnir hava í flestu førum verið fúsir at taka støðu og greiða frá sínum hugburði. Ferðsludagurin hevur fingið sera góð skotsmál frá næmingunum øll árini, sum eftir hvønn dag hava eftirmett virksemið.










# KUNNINGARÁTØK

## GÁLOYSNI

Fyrsta átakið í 2012 var um gáloysni undir heitinum, 'Tað skal so lítið til'. Gjørdar vórðu tvær Gallup-kanningar, ein áðrenn og ein aftan á seinasta almenna lýsingarátakið. Kanningar vísa, at gáloysni er orsøk til 3. hvørja ferðsluvanlukku.
Endamálið við átakinum var at broyta hugburðin: "Eg kann gott gera ymiskt annað, meðan eg koyri bil" til at minna okkum á, at tað skal lítið av gáloysni til, at vanlukkan hendir. Við átakinum, sum varð gjørt í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar, vildi Ráðið hava bilførarar at virða koyriuppgávuna í sær sjálvari, og hugsavna seg um hana, tá teir sita við róðrið. Úrslitið í gallupkanningini vísti eina munandi broyting í hugburði og atburði í føroysku ferðsluni eftir einans fýra mánaðum.

### KVINNUR TAKA BOÐSKAPIN UM GÁLOYSNI Í FERÐSLUNI BETUR TIL SÍN

Sum heild vísa tølini, at føroysku kvinnurnar hava tikið boðskapin um gáloysni í ferðsluni betur til sín enn menninir. Í november 2011 søgdu 7 % av kvinnunum og 10 % av monnunum seg tosa dagliga í fartelefon uttan snigil ella head-sett, meðan tey vóru bilførarar. Fýra mánaðir seinni vóru hesi tølini komin niður á 3 % av kvinnunum, meðan talið tíverri var farið upp á 19 % hjá monnunum. Talið á teimum, sum siga seg ongantíð brúka fartelefon uttan snigil ella headsett er óbroytt: 41 % av monnum, meðan parturin av kvinnum er vaksin úr 49 upp í 54 %. Tá ið tað kemur til at brúka fartelefonina til lesa/senda sms, teldupost og líknandi meðan koyrt verður, svaraðu 72 % av kvinnum áðrenn átakið, at hetta gjørdu tær ongantíð. Hetta talið var komið upp á 85 % í februar. Parturin var tíbetur eisini farin upp hjá monnunum, har hann vaks úr 70 % upp í 75 %.

At fegnast um er, at kanningin bendir á, at ung millum 18 og 24 ár tykjast hava tikið boðskapin til sín. Í fyrru kanningini vóru tað bara 27 %, ið søgdu seg ongantíð brúka fartelefonina til lesa/senda sms, teldupost o.l. meðan koyrt varð. Í seinnu kanningin varð hetta talið komið upp á 54 %. Hendan tulking skal tó takast við fyrivarni, tí talan er um lág tøl í hesum aldursbólki. Allir aðrir aldursbólkarnir høvdu somuleiðis vaksandi part, sum svaraðu 'ongantíð' eftir átakið.

## FERÐ

Í juni høvdu Ráðið og Trygd átakið, 'Vel røttu síðuna', har endamálið var at at fáa vaksandi part av føroyingum at halda hámarksferðina og gerast tilvitaðir um vandan í at koyra ov skjótt á vegi, har hámarksferðin er 80 km/t. Í átakinum varð greitt frá, at ferðin bert skal eitt vet upp um hámarkið, fyri at vandin fyri at doyggja økist munandi.

Tvær gallupkanningar vórðu gjørdar í sambandi við átakið, tann fyrra í apríl og tann seinna í juni 2012, beint aftan á átakið.

Samanumtikið sæst, at átakið gjørdi mun. Fleiri siga seg halda hámarksferðina á 80 km/t enn áðrenn átakið. Spurd, hvussu skjótt tey vanliga koyra á vegi við hámarksferð á 80 km/t, er parturin, sum sigur seg koyra 80 km/t ella lægri vaksin úr 32 % upp í 36 %. Parturin av teimum, sum koyra 90 km/t er lækkaður úr 55 % niður í 51 %, og parturin av teimum ið koyra 100 km/t, er lækkaður 10 % niður í 9 %. Áhugavert er, at samstundis siga 43 %, at 80 km/t ella lægri er hóskandi ferð og 43% at 90 km/t er hóskandi hámarksferð. Tað er





ein munandi partur, sum viðgongur seg at koyra skjótari, enn tey sjálvi halda vera hóskandi.

### MENN HAVA TIKIÐ BOÐSKAPPIN BEST TIL SÍN

Menninir hava í ávísan mun tikið boðskapin til eftirtektar á 80 km vegi. Parturin, ið koyrir 80 km/t ella lægri, er hækkaður úr 29 % upp í 36%, sum er líka stórur partur sum kvinnur.
Parturin av monnum, ið koyrir 90 km/t, er minkaður úr 57 % niður í 49 %, eins og teir, ið koyra 100 km/t er minkaður úr 13 % niður í 12%. Hetta er sera nøktandi. Ein samsvarandi vøkstur í at halda hámarksferðina sæst tíverri ikki hjá kvinnunum.
Parturin av kvinnum, sum heldur hámarksferðina á 80 km/t, er óbroyttur 36 %. Kvinnurnar koyra eisini framvegis ov skjótt. Tað vil siga, at talið á teimum, sum siga seg koyra 90 km/t, er óbroytt 54 % eftir átakið.

### HÆGSTU OG LÆGSTU INNTØKURNAR HAVA LURTAÐ

Hyggja vit at inntøkubýtinum, vísir seg, at fólk við hægstu og lægstu inntøkunum hava tikið best ímóti boðskapinum, meðan fólk við miðalinntøkuni 251-600.000 kr í lítlan mun hava sett ferðina niður á 80 km/t-vegi. Parturin av teimum við lægru inntøkunum, sum halda hámarksferðina á 80 km/t, er vaksin úr 57 % upp í 71 %, tað vil siga 14 %-stig, meðan parturin av teimum við hægstu inntøkum vuksu úr 13 heilt upp í 29%, tvs 16%-stig fleiri. Samstundis er parturin av bilførarum við hægstu inntøkum, sum koyrir 90 km/t lækkaður úr 70 % niður í 56 %, samanborið við eina minking hjá lægstu inntøkunum úr 31 % niður í 15 %. Hetta er serstakliga gott úrslit, og vísir eina heilt ítøkiliga broytta atferð.

Ráðið er væl nøgt við úrslitið, sum vísir, at átakið saman við Trygd hevur verið væl móttikið og hevur verið við til at betra hugburðin til ferð. Tølini broytast rætta vegin. Tó er langt eftir á mál. Áðrenn átakið var tað knappur triðingur, ið helt hámarksferðina á 80 km/t, eftir átakið er tað 36%. Her talan um eitt átak á góðar tvær vikur, sum er lutfalsliga stutt. At hugburðurin kortini er broyttur til tað betra, er ein góð byrjan, sum arbeitt verður víðari við.

## TRYGDARBELTI Í BUSSUM

Í oktober minti Ráðið í samstarvi við løgregluna á nýtslu av trygdarbelti í bussum. Tó at trygdarbelti eru í øllum bussum hjá Strandfaraskipum Landsins (SSL), verða hesi at kalla ikki brúkt. Samstarvið fevndi eisini um SSL, sum fekk skelti, sum minna á trygdarbelti, sett upp við hvønn busssess, eins og bussførarar mintu ferðafólk á beltið. Løgreglan fylgdi upp við at gera eftirlit í bussum, meðan átakið var.

Ráðið hevur fingið fleiri uppringingar og viðkomandi spurningar á facebooksíðuni um trygdarbelti í bussum. Eisini tykist áhugin hava smittað til býarbussar og leigubussar, har fólk undrast, at eingi trygdarbelti eru, eins og summi eru ónøgd við manglandi bilpútur og barnaútgerð í bussum. Samstarvið við SSL hevur gingið væl. Eftirlit hjá politinum vísti tó, at tað eru millum 40 % og 75 % sum ikki brúktu trygdarbelti, meðan átakið var. Ráðið fer at fylgja átakinum upp í 2013.









*framhald:*

# KUNNINGARÁTØK

## RÚSDREKKA

Í tíðarskeiðinum, har jólagildi eru kring landið, var rúsdrekkaátakið, 'Vinir lova ikki vinum at koyra skít'. Rúsdrekkakoyring er framvegis ein álvarslig hóttan móti ferðslutrygdini. Í okkara grannalondum er rúsdrekka somuleiðis ein stórur trupulleiki, sum stendur fyri einum munandi parti av teimum deyðu og álvarsliga skaddu í ferðsluni. Útlendskar kanningar vísa, at tey mongu taka frástøðu frá rúsdrekkakoyring, kortini er tað eitt kent fyribrigdi. Tað kann vera langt frá hugburði til atferð.

**Endamálið við átakinum kann býtast í trý:**

1. Tað fyrsta er at ávirka fólk, sum kundu umhugsað at koyrt, tá tey hava smakkað sær á
2. Í øðrum lagi vilja vit minna vinfólk, familju og starvsfelagar rundan um tann við ov høgari promillu á at leggja seg út í støðuna, um hesin ætlar at koyra
3. Tað triðja er, at vit vilja gera vart við, at tað er umsorgan at leggja seg út í støðuna – eingin vil sínum næsta so illa, at hann gerst rúsdrekkakoyrari

### IKKI SOSIALT GÓÐTIKIÐ

Varhugi Ráðsins er greitt, at tað heldur ikki í Føroyum er ikki góðtikið millum manna at koyra ávirkaður. Í gallupkanning í juni í 2012 vórðu føroyingar spurdir, hvussu ofta teir høvdu koyrt við eini promillu hægri enn 0,2. Her svaraðu 94% 'Ongantíð', meðan 3 % svaraðu 'eina ferð um árið ella sjáldnari', og 1 % svarað 'eina ferð um hálvárið' og eisini 1 % svaraði 'eina ferð um mánaðin'. Tað eru sostatt lutfalsliga fá, sum – hóast ónevnd - siga seg koyra við ov høgari promillu. At rúsdrekkakoyring ikki er sosialt góðtikið kann væntast at hava eina avmarkandi effekt í sær sjálvum.

Átakið er trupult at eftirmeta, við tað at fyribrigdið er fongt av tabu. Varhugin er tó greitt, at fólk hava tikið væl undir við tí: Skeltini, ið framleidd vórðu til skeinkistøð landsins, vórðu væl móttikin og hanga enn nógvastaðni. Fólk hava deilt útsøgnina á Facebook. "Eg lovi ikki mínum vinum at koyra skít!" í nærum 300 førum, umframt at mong hava dámað myndir og útsagnir, ið vórðu løgd út.

## VERNDAREINGLAR VÍSA VEG

Føroyingar trívast væl í myrkum klæðum. Í november minti Ráðið ung sum gomul á at brúka endurskin. Hetta við verndareinglum í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar. Endamálið er at fáa fleiri fólk at brúka endurskin, tí við endurskini eru fólk til gongu nógv skjótari sjónlig hjá bilførarum.

Til bar hjá fyriskipanum av tiltøkum at lána einglaveingir frá Ferðslutrygd. Hetta til dømis, tá jólatrø í bygd og bý verða tendrað og til onnur tiltøk. Veingirnir verða so brúktir av fólkum, sum virka sum verndareinglar, sum býta út endurskin. Tey sum skipa fyri, fáa sostatt fólk at ganga við veingjunum og býta út endurskin. Ráðið lænir út veingirnar og taskurnar, meðan Tryggingarfelagið Føroyar letur endurskinini. Til tendringina av jólatrænum í Havn vóru fleiri býráðspolitikarar í veingjum og býttu út endurskin.

**VINIR LOVA IKKI VINUM AT KOYRA SKÍT.**

# VIRKSEMI OG ÁTØK FYRI FRAMMAN

Umframt fyribyrgjandi kunningarátaøk hevur ráðið fyri 2013 sum fremsta mál at arbeiða við framleiðslu av undirvísingartilfari. Ein týðandi fortreyt fyri at hetta ber til, er at fingin verður til vega dagførd heimasíða.

## FRAMLEIÐSLA AV UNDIRVÍSINGARTILFARI

Í fólkaskúlalógini er ásett, at ferðsla er eitt av fýra kravdum undirvísingarevnum í føroyska fólkaskúlanum, og sum ásett er í viðtøkum Ráðsins, er tað tess uppgáva at stuðla undir hesa undirvísing og menningina av undirvísingartilfari.

Sølan av sonevndu Guðrun & Guðrun-endurskinsvestunum, sum er eitt samstarv við Guðrun og Guðrun og Tryggingarfelagið Føroyar, er oyramerkt til framleiðslu av undirvísingartilfari. Í januar 2013 varð farið undir at arbeiða ítøkiliga við hesum. Verkætlanarfólk er sett í tíðaravmarkað starv fram til hálvan juni 2013 at hava ábyrgd av hesum arbeiði. Ítøkiliga er málið at skipa eina undirvísingarætlan fyri ferðslulæru í fólkaskúlanum, at tryggja kjølfesti og einsháttaða raðfesting av ferðslu í skúlunum kring landið, at seta gongd á framleiðsluna av undirvísingartilfari til fólkaskúlan og skipa eina tíðarætlan fyri framburði í framhaldandi framleiðsluni.

Ásannandi at at kalla einki nýtt og dagført undirvísingartilfar finst á føroyskum, er leitað til grannalondini fyri at kanna, hvussu tey skipa sína ferðsluundirvísing. Norðurlondini arbeiða í stóran mun eftir sama leisti, og tykist hesin bæði skynsamur og greidligur at arbeiða eftir. Tískil er útgangsstøðið eisini tikið í hesum í føroysku ætlanini.

Í sambandi við sjálva framleiðsluna av undirvísingartilfari er hesin parturin merktur av einum sera avmarkaðum fíggjarligum rásarúmi. Tískil er dentur í høvuðsheitum lagdur á at finna fram tilfar úr grannalondunum, sum vit antin kunnu umseta beinleiðis ella nýta sum íblástur til egna, føroyska framleiðslu.

Dentur verður lagdur á at framleiða talgilt tilfar, av tí at hetta er mest tíðarhóskandi og lættari at dagføra enn til dømis prentað tilfar. Verandi heimasíða hjá Ferðslutrygd hevur nógvar avmarkingar og klárar neyvan at lofta nýframleiddum tilfari sum hesum. Tí verður farið undir at arbeiða við eini nýggjari síðu í ár. Ein nýggj heimasíða er ein fortreyt fyri, at nýtt undirvísingartilfar um ferðslu verður tøkt.

## KUNNIGARÁTØK Í 2013

- **Ferð í samstarvi við Trygd**
- **Ung í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar**
- **Verndareinglar vísa veg í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar**
- **Seyður á vegnum**
- **Trygdarbelti í bussum**
- **Rúsdrekka**





RÁÐIÐ FYRI
FERÐSLUTRYGD

TUNGUGØTA 4 · POSTSMOGA 3209 · 110 TÓRSHAVN · TEL. 220064 · TELDUPOSTUR: RFF@RFF.FO · WWW.RFF.FO